gult cyan magenta svart

100.000 krónur til brekað børn

Í samband við samanlegging millum Tórshavnar Kommunala Starvs- & Tænastumannafelag og Starvsmannafelagið 1. juli 2000, var avgjørt, at ein partur av ognum felagsins skuldi fara til vælgerandi endamál.

Avgjørt er, at lata rørðslu- og menningartarnaðum børnum 100.000 kr. til frítíðarvirksemi.

Hesin bólkur hevur, sum er, ikki nógvar møguleikar fyri aktivering, men hevur býráðið tó givið teimum møguleika at nýta Bridgehúsið seinnapartar. Stuðulsfólkaskipanin, sum stendur fyri hesum, hevur sett ynski fram um at fáa til vega telduútgerð, sum børnini kunnu nýta og er hendan útgerð nú sett upp í Bridgehúsinum.

Hendan útgerð, saman við restini av upphæddini varð handað mánadagin, sigur Kartni Ravsnfjall, formaður felagsins í tíindaskrivi.

22.-24. mars 2001 í Glasgow

Fishing 2001 framsýningin

Fishing framsýningin, sum tey seinastu árini er hildin í Glasgow, er vorðin størsta árliga afturvendandi fiskivinnustevnan í Evropa. Hon er sostatt vorðin tann framsýningin, har veitarar av útgerð, tøkni og tænastum til fiskivinnuna, úr øllum heiminum, føra seg fram. Framsýningin verður av tí sama vitjað av støðugt fleiri innan fiskivinnu.

Áhugin fyri framsýningini veksur framvegis. Longu nú er greitt, at Fishing 2001, við hvussu so er, verður 20% størri enn Fishing 2000. Fyrireikararnir hava tí verið noyddir til at taka eina høll afturat í nýtslu fyri at tryggja framsýningini neyðuga rúmd.

Føroyskar fyritøkur hava síðan 1995 luttikið á Fishing framsýningunum, og fleiri av teimum hava fingið væl burtur úr. Kappingarførið hjá teimum er hesi somu ár styrkt, og tær eru vorðnar kendar og eftirspurdar víða um í heiminum.

Eisini á Fishing 2001 fara føroyskar fyritøkur at luttaka. Longu nú er stórur partur av teimum 96 m², við Menningarstovan hevur bílagt á framsýningini, umbiðin, og Team 85 er farin undir at tilevna føroyska básin.

Fishing 2001 verður hildin 22.-24. mars 2001 í Glasgow í Scottish Exhibition & Conference Centre.

Fyritøkur, sum hava áhuga í at luttaka á Fishing 2001, kunnu annaðhvørt venda sær til Team 85 ella til Menningarstovuna.

Til ber eisini at fáa meira at vita um framsýningina á www.trade.fo.

Menningarstovan
Faroe Islands Trade Council

VIÐMERKING

Dupultspæl løgmans

Jóannes Eidesgaard

Eg eri rættiliga sannførdur um, at løgmaður spælir eitt dupultspæl, har hann letur Tjóðveldisflokkin liva í tí trúgv, at her stendur væl til, samstundis sum hann førir eitt heilt annað slag av samrøðum við danska forsætismálaráðharran.

Sjálvandi eru vit mong, sum vóru heldur bilsin av bævinum dagfest 14. des. 2000, sum Nyrup sendi løgmanni. Tí tað stutta av tí langa er, at forsætismálaráðharrin sigur, at nú er greitt at fara undir samráðingar um tað, sum løgmaður hevur fyrisligið á fundi teirra millum í Reykjavík 5. nov. 2000, nevniliga eina víðkaða heimastýrislóg í ríkisfelagsskapinum.

Var tað ein sambandsløgmaður, so var tað sín søk, men hevur fulveldisløgmaðurin veruliga borið slíkar broytingar fram á fundinum í Reykjavík?

Uppaftur meira bilsin verða vit, tá vit so síggja í bløðunum í gjár, at løgmaður sigur seg vera ovfarnan av bævinum frá Nyrup, og í skundini sendir løgmaður annað bræv avstað. Í bævinum sigur hann enn einaferð, at beinleiðis samráðingar verða um at broyta heimastýrislógina, men nú er hetta bert teknikkur, so hetta skulu embætisfólk taka sær av. Nær í Guðs garði er heimastýrislógin vorðin teknikkur?

Og sum rosinan í pylsuendanum kemur varaløgmaður albrynjaður við egnum opnum bævi, har hann sigur, at nú mugu vit taka sakina í egnar hendur.

Men vóru vit mong, sum vóru bilsin av fyrsta bævinum, so eru vit fleiri, sum eru totalt forvirraði yvir tað, sum er hent síðani.

Eg havi so ta teori, at her

er talan um eitt dupultspæl frá løgmansins hond. Eg eri sannførdur um, at danski forsætismálaráðharrin fer ikki at skriva í einum bævi til løgmans: »Við vort møde den 5. november 2000 foreslog du, at der nu indledes forhandlinger om en ændring af hjemmestyreloven, således at der inden for rigsfællesskabets rammer skabes bredere grundlag for hjemmestyrets adgang til at overtage yderligere samgsområder.«, uttan so, at løgmaður á fundinum hevur borið hetta upp á mál. Tað sigur seg sjálvt, at tað er júst hetta, teir hava tosað um, tí endurtekur løgmaður hetta í bævinum frá 18. des. 2000.

Og innast inni vita bæði Høgni Hoydal og vit onnur, at hóast Nyrup er Nyrup, so hevur hann ikki misfatað løgmann í Reykjavík. Og av góðum grundum vita hvørki Høgni Hoydal ella vit onnur, hvussu orðini eru fallin í Reykjavík, tí vit vóru ikki har, men eftir stendur so gamla orðafellið, at sjáldan ríkur av ongum brandi.

Og fyri at bjarga egnum skinni og fyri at kyrra Tjóðveldisflokkin, so sigur løgmaður seg vera ovfarnan av bævinum frá Nyrup. Og opinbart er tað tað, sum skal til, fyri at Tjóðveldisflokkurin aftur heldur, at nú er alt í lagi. »Tað er hasin forrendi Nyrup, sum provokerar.«

Og taka vit samanum tað, sum bæði løgmaður og Helena Dam á Neystabø áður hava sagt, so er tað í tráð við júst innihaldið av bævinum frá Nyrup. Vit skulu gera broytingar í heimastýrislógini , og síðan skal hon tømast, hava tey sagt.

So roynir løgmaður at skøva útyvir við at siga, at her verður ikki talan um politiskar samráðingar, tí hetta er reinur teknikkur. Men løgmaður veit fullvæl, at broytingar í heimastýrislógini er politikkur, so tað stendur eftir, eins væl og ein niðurlaging av blokkinum eisini er tann reini politikkur og einki annað.

Er alt hetta eitt dupultspæl, so dugur løgmaður listin sum fáur, men einaferð verður hann avdúkaður.

Seinasta semjan frá 2. nov. 2000, sum landsstýrið gjørdi, var so meistarliga skrúva saman, at allir tríggir flokkarnir kundu leggja tað í semjuna, sum teir høvdu hug til. Og sjálvandi fekk Fólkaflokkurin framgongd í veljarakanningini, tí nú var fullveldið slept, og sjálvandi fekk Tjóðveldisflokkurin framgongd, tí nú var fullveldið ikki slept. Tað einasta, sum kann undra mangan er, at Sjálvstýrisflokkurin, sum veruliga eigur hasa stig fyir stig semjuna innan fyri heimastýrislógina, hann fekk aftur gongd. Men bíða nu.

Men semjan er eitt skúladømi um, hvussu meistarliga løgmaður letur allar partar liva hvør í sínum lag í síni sæligu trúgv. Hann er ein meistari í dupultspæli.

Nú skilja vit betur ynski um, at allar samráðingarnar skulu vera í trúnaði.

Løgmaður hevur gjørt seg til heitan talsmann fyri, at samráðingar endiliga mugu vera í trúnaði. Men tað skilji eg væl, tí hann er bangin fyri, at Tjóðveldisflokkurin skal uppdaga, hvat veruliga fer fram. Hann dylur tað ikki fyri okkara skuld, men tí hann noyðist at dylja tað, soleiðis at tjóðveldismenn ikki skulu finna útav, hvussu leikur fer fram handan tjøldini, har sjálvt teir ikki sleppa við.

Gongur tað heilt galið, so tekur løgmaður gamla trumfin fram, at um tjóðveldismenn ikki skikka sær ordiliga, so sendur hann boð eftir javnaðarmonnum, og so tiga teir aftur og spæla fullveldið viðari.

Varaløgmaður er hóast alt erligur í sínum ynski um eitt fullveldi, men Føroya land kann ikki leingi liva við einum løgmanni, sum sigur eitt her heima og nakað heilt annað aftan fyri læstar dyr saman við Nyrup.

Mín niðurstøða er í hvørfall greið, hetta er dupultspæl. Hetta er ein einmansleikur, og sjónleikari og instruktørur er ein og sami maður Anfinn Kallsberg.

ítróttur

Nr. 246 • hósdagur • 21. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Føroyingar móti heimsmeistarunum

Um góða viku skulu sterkastu føroyingarnir royna seg móti heimsins sterkasta pari

STYRKI
Jákup Mørk

Fólk tíma ikki longur at hyggja at, hvør verður føroya sterkasti maður. Tað heldur Regin Vágadal í øllum førum, og satt at siga, so man spenningurin um hesa kapping ikki vera so stórur longur, sum hann onkuntíð hevur verið.

Tískil hevur Regin gjørt av, at hann ístaðin fyri at stríðast við teir sterkastu her heima, heldur fer at royna seg móti heimselituni, og fyri heimligu áskoðararnar verður talan um eitt spildurnýtt slag av kapping.

Sámal verður við

Talan er nevnliga ikki um eina kapping, sum líkist tí um Atlantsrisan, men um eina kapping, har luttakararnir kappast tveir og tveir.

Regin hevur áður umboða Føroyar í slíkum kappingum, men tá hevur tað verið í parti við onkrum útlenddskum íðkara.

Sum nakað spildurnýtt verður tað nú ein føroyingur, sum verður í parti við Regini, og hesin er helst tann einasti, sum her heima hevur givið Regini nakað av mótstøðu, nevnliga Sámal Johannis Joensen.

Regin sigur, at teir báðir hava vant miðvíst í eina tíð, og á fleiri økjum hava teir betra munandi um avrik síni. Eitt nú vísir Regin á, at teir hava skorið nærum ein triðing av tíðini, tá teir hava roynt at koppa dekk.

Móti heimsmeistarunum

At fremja eitt gott avrik, verður eisini neyðugt, um teir báðir skulu gera sær nakrar vónir um at vinna kappingina, sum verður í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.

Mótstøðumenn teirra koma úr Finnlandi, og seinastu fýra árini hevur Finnland eisini vunnið kappingina um at gerast heimsins sterkasta par.

Annar parturin í sterka parinum kann í løtuni eisini rópa seg heimsins sterkasti einstaklingur, tí Janne Virtanen vann kappingina í Suðurafrika, har Regin annars kom í finaluna. Afturat sær hevur Janne Jani Tolonen.

Ætla sær uttanlands

Spurdur, um samstarvið við Sámal Jóhannis er ætla sum ein varandi loysn, sigur Regin, at tað í øllum førum er ætlan teirra. Enn hava teir ikki boðað frá luttøku í nakrari aðrari kapping, men sjálvur vónar Regin, at hetta fer at bera til hjá teimum.

– Tað er eitt sindur keðiligt, at man altíð er einsamallur á ferðunum, og tí hevði tað verið hugaligt, um vit vóru tveir, sigur Regin.

– Úrslitini í parkappingunum verða heldur ikki nóg góð, tá eg ongantíð eri í parti við tí sama. Eg havi onkuntíð verið við einum hollendingi onkuntíð við einum dana og onkra aðra ferð einum finnlendingini, og tá verður samspælið okkara millum ongantíð nóg gott.

Kappingarnar

Fyrsta royndin hjá teimum báðum verður so hósdagin, 28. januar, og tá verður kappast í fimm greinum.

Fyrst skulu 30 sekkir við MBM fóðuri (1200 kg ialt) flytast í eini »loading-event«. Hetta verður gjørt soleiðis, at annar hvílir, meðan hin lastar, og so gera teir sjálvir av, nær teir skiftast.

Eftir hetta skulu teir í felag halda einum 50 kg tungum Sony-sjónvarpið í strektum armum, og tá ræður sjálvandi um at halda so leingi, sum gjørligt. Í hesum sambandi kann nevnast, at í júst hesari kappingargrein hevur Sámal Jóhannis vanliga verið sera sterkur.

Triðja kappingin er tann vælkenda dekk-koppanin, har eitt stórt dekk skal koppast yvir ein ávísan tein. Her verður kappast í trimum umførum, og er vinnarin so tað liðið, sum vinnur tvey av hesum.

Í næst seinastu kappingini ræður um at lyfta ein viðarbul upp um høvd so ofta sum gjørligt. Hvørt liðið hevur tríggjar minuttir at lyfta í, og eins og í fyrstu kappingini, er tað bert annar parturin, sum lyftur í senn.

Fyri áskoðararnar er seinasta kappingin kansk hin mest undirhaldandi. »Pool-push« eitur kappingin, og pørini tá royna at kroysta hvønn annan úr einum avmerktum øki við hjálp av einum viðarbuli.

Kappingin verður sum nevnt 28. desember, og lagt verður til brots kl. 20.00. Hildið verður so fram til allar greinarnar eru av, og verður hetta væntandi umleið kl. 22.00.

Tá Regin fer at kappast hósdagin, verður tað fyrstu ferð, at tveir føroyingar fara at royna seg saman í styrkiskapping

Vøkur sprund

Umframt sterkar menn, verður eisini høvi at síggja vøkur sprund uppi á Hálsi

STERK&VØKUR
Jákup Mørk

Sum nevnt aðrastaðni í hesum síðum, so fara Regin Vágadal og Sámal Jóhannis Joensen at kappast uppi á Hálsi komandi hósdag.

Umframt at kappast verður í styrki, so verður eisini ein onnur, og kanska eins spennandi kapping á skránni.

Eingin steðgur

Miss Galaxy eitur kappingin, og her verða tað føroysk konufólk, sum fara at dystast, og kappingin fevnir ikki bara um at síggja væl út.

Kappingarnar hjá kvinnunum fara fram meðan sterku menninir hvíla seg, og tí verður ikki talan um nakran langan steðg ímillum kappingirnar. Nakað sum nógv annars hava funnist at fyrr.

Í altjóða høpi

Sum nevnt, so ræður ikki bert um at rigga væl í hesari kapping, men konufólkini mugu eisini vera kropsliga væl fyri.

Tær báðar fyrstu kappingarnar skulu sprundini ganga í ávíkavist kjóla og bikini, meðan seinasta kappingin er eitt slag av forðarenning, har tær skulu sveiggja seg eftir nøkrum rimum, klintra upp um veggir og grulva gjøgnum rør.

Sum nakað heilt nýtt, fær vinnarin av hesari kapping møguleikan at sleppa út í heim at kappast.

Miss Galaxy er nevnliga ein altjóða kapping, og vinnarin av kappingini í Føroyum fær høvi at luttaka í bæði EM- og HM høpi, og verða hesar kappingarnar í ávíkavist Barcelona og Beijing.

Regin Vágadal sigur, at talið á luttakarum væntandi fer at verða millum átta og 10. Talið var annars væl høgri, men tá tað kom fram, at tær eisini skuldu vísa seg í bikini, vóru fleiri, sum lupu frá, sigur Regin, sum annars ætlar, at kappingin skal verða afturvendandi.

Sum nevnt, so verður kappingin í Ítróttahøllini á Háldi komandi hósdag kl. 20.00

GÍ styrkir álopspartin

Pólverskur áleypari skal komandi árið gera álopið hjá gøtumonnum hvassari

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Fyri stuttum skrivaðu vit, at gøtumenn hava gjørt avtalu við ein pólskan miðvallarleikara. Ein av tí slagnum, sum kanska er komin nakað upp í árini, men hinvegin eisini ein leikari við drúgvum royndum á bæði felags- og altjóða støði.

Helst hava gøtumenn havt í umbúna at styrkja um annað og meira enn miðvøllin. Í øllum førum er tað nú ein sannroynd, at tað verða tveir pólverjar millum leikararnar, sum komandi ár fara at stríðast um pláss á liðnum.

Talan er umframt miðvallaran, eisini um ein nýggjan áleypara, Marek Wegil. Hesin er 31 ára gamal, og hevur í nógv ár verið í pólskum fótbólti, har hann hevur spælt í næstbestu deildini.

Petur Holm, nevndarlimur í GÍ, sigur við Sosialin, at hesin spælaran kanska ikki tykist heilt so sterkur á pappírinum, men smb. keldunum hjá Gøtumonnum er talan tó um ein leikara, sum ivaleyst kann styrkja um álopspartin.

Víðari sigur Petur, at sáttmálin við leikaran fevnir um eitt ár, men at fyrstu vikurnar av hesum eru ætlaðar sum royndartíð, soleiðis at partarnir fyrst kunnu meta eitt sindur um hvønn annan.